# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## KÆRLEIKANS DAGUR

Sunnudagin er Valentine's dagur. Jú, víst er tað meira og meira ein handilsligur dagur, men tað eru mong, sum vilja markera hendan kærleiksdag. Og hvørji ráð eru so til at taka? Ein bretsk kanning vísur, at tríggjar av fýra kvinnum ynskja sær eina yrking ella eitt fríggjarabræv.
Valentine's dagur

**VALENTINE'S DAGUR**
Sunnudagin 14/2



## PETER GABRIEL KLÓRAR

Enski tónleikarin og sangskrivarin Peter Gabriel er nú klárur við nýggjum tónleiki. Hann var partur av bólkinum Genesis, men hevur eisini givið tónleik út sum solistur. Nýggja fløgan inniheldur coverløg, sum Peter Gabriel hevur tulkað á sín serstaka hátt.

**PETER GABRIEL: SCRATCH MY BACK**
EMI Music 15/2



## FILMURIN TIL VIKUSKIFTIÐ

Sunnudagurin er Valentine's Dagur, og um vikuskiftið ber til at fara í biograf og hyggja eftir filmi um hendan dag. Filmurin við sama navni sum dagurin bjóðar eina røð av kendum sjónleikarum – millum annað Anne Hathaway, Jessica Biel, Julia Roberts, Jessica Alba, Jennifer Garner, Patrick Dempsey og Jamie Foxx.

**VALENTINE'S DAY**
Havnar Bio frá hósdegnum 11/2



## MEIRA STEYPADRAMA

Enska steypakappingin FA Cup hevur bjóðað nógvar dramatiskar dystir og óvæntað úrslit. Fleiri av stóru feløgunum eru send úr kappingini, og um vikuskiftið rýkir helvtin av teimum, sum eftir eru. Ein av spennandi dystunum er millum ríka Manchester City og Stoke.

**MANCHESTER CITY-STOKE**
**FA CUP**
Kanal 6 leygardagin 13/2 kl. 17.15



## LÆR AT DANSA CHA CHA CHA

Nú er møguleiki at fáa eitt sindur av farti í føturnar og ferð á kroppin. Næstu trý týskvøldini verður undirvísing í Cha Cha Cha dansi í Havn. Undirvísingin er bæði fyri einstaklingar og pør.

**DANSISKEIÐ Í CHA CHA CHA**
Fimleikahøllin á Læraraskúlanum
Týskvøldið 16/2



## HANUS HEIMA Í KLAKSVÍK

Hanus G. Johansen er í hesum døgum á konsertferð við tveimum av Føroya fremtsu tónleikarum. Saman við sær hevur hann Hanus Magnus Johannesen á klaver og Mikael Blak á kontrabass. Nýggja trio'in framførir nýggj løg hjá Hanusi til yrkingar hjá Pól F. Joensen.  Karmur um konsertina leygarkvøldið er Spaniastova, elsti partur í gamla einahandlinum í Klaksvík.

**HANUS G. JOHANSEN**
Leikalund í Klaksvík
Leygarkvøldið 13/2 kl. 21.00

## AMARIEL Í FOCUS

Amariel Norðoy telist millum teir virknu føroysku listamenninar. Hann sýnir fram bæði úti og heima, og hann hevur longu í ár verið av landinum við málningum. Í dag letur hann upp framsýning í Havn, sum verður opin um vikuskiftið.

**AMARIEL NORÐOY**
Framsýning í Galerie Focus
Fríggjadagin 12/2-Sunnudagin 14/2 kl. 16-19

